# Nøvn

## Minningarorð um vinmannin
# Herman Fuglø
### 11/12-1959-9/11-2010

Dátt vóru boðini eg fekk eitt mánakvøld fyrst í november.

Mín besti vinur síðan barnaárini og javnaldur brádliga var farin.

Eg kom at kenna Herman, tá eg sum smádrongur plagdi at koma til Nordepils at ferðast. Vit spældu saman mestsum hvønn einasta dag. Eg minnist enn túrarnar eftir tunnelvegnum har vit leitaðu eftir tómum fløskum og soleiðis hugnaðu vit okkum úti í vøkru náttúrini.

Tað kom eisini fyri at Herman kom norður til Múlar at ferðast og so gingu vit í haganum ella fóru ein túr á seiðaberg. Eingin vegur var til Múlar tá, so tað mátti gangast ímillum, og ikki altíð líka tespiligt ganguveður var heldur. Minnist enn ein túr vit skuldu inn aftur í sund. Tað var vetur og nógvur kavi lá so eingin gøta var sjónlig. Samtíðis var hálv ódnarveður og kavarok, men vit høvdu sett í okkum at vit vildu avstað. Minnist abbi mín hevði á orði: "fólk fara at halda, at tit eru útkoyrdir ". Men vit vóru ungir so vit hildu tað ikki fór at bila, men túrurin gjørdist langur nokk.

Herman fór til sjós skjótt aftaná, at hann var fermdur. Línubátur sjálvandi, tí hann var vanur við at egna aftaná skúlatíð fyri at tjena nøkur oyru. Eg gekk eitt sindur longri í skúla, so tað var seinni at vit komu at sigla saman. Men annars vóru vit saman tá tað lá fyri.

Men so kom tað til, at vit valdu hvør sín vinnuveg á sjónum. Hann helt áfram sum fiskari hvar eg valdi farmavegin og sigldi út í heimin. Men vóru báir heima ísenn, so vóru vit saman. Har annar var, var hin ikki langt vekk, havi eg hoyrt sagt um okkum og tað var so.

Herman var eisini sera góður við hondum sínum. Annahvørt tað var húsabygging ella onnur smíðing, evni han hevði frá abba sínum. Hann var altíð til reiðar tá hann bleiv spurdur um hann kundi rætta eina hond við onkrum, antin at tekja ella annað viðlíkahald.

Eg spurdi hann fleiri fer hví ikki hann valdi at útbúgva se innanfyri trævverk, men hann svaraði altíð, at honum ikki tokkaði langar skúladagar aftur.

Men sum so mangan er hent øðrum góðum fólkum so kom lagnan upp í, og hann gjørdist sjúkur. Ein sjúka sum kemur sum tjóvur á nátt og tekur valdi á sál og kroppi. Sum fekk so stórt vald, at tað var ov tungt at stríðast ímóti.

Men eg takki fyri góðar løtur og upplivilsir vit fingu saman, tú Herman hevur givi mær so nógva gleði og minnir. Eg veit tú er komin eitt betri stað at vera. Eg veit fullvæl hvussu tú hevur haft tað sálarliga tey seinastu nógvu árini. Eg flutti til Danmarkar so tað gjørdist langt ímillum vit sóust, men eg fekk altíð vitjan tá eg so var heima á klettunum, og takk fyri tað Herman.

Mína djúpastu samkenslu sendi eg tykkum avvarðandi, mamman Òluva, og systkini Bodil, Erland, Pól, Jónfríð, Ingibjørg og Jóhan Edvard.

Má Guð veita tykkum troyst og ugga.

Friður verið við minnið um Herman.

**Hans Helge Ritter**

## TØKK

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt sýndu virðing og samkenslu, tá elskaða kona, mamma, vermamma, systir og dóttir

**Frida Jacobsen**
**Nólsoy**

andaðist og varð jarðað.

Eina serliga tøkk senda vit til øll á Landssjúkrahúsinum, sum vóru so væl um hana og okkum síðstu tíðina.

*Familjunnar vegna*
**Brynjálvur, Kenneth og Ronny**

*Øllum verða eisini ynskt eini gleðilig jól og eitt eydnuberandi nýggjár.*

Jólamaðurin „Kjøtkrókur" ynskir øllum eini gleðilig jól




...og takkar niðanfyristandandi fyri dyggan stuðul

Atlanticpane · Føroyar · Bygma · MBM · Skemman · BR · sms · inn Við Landavegin · Daddan · fk í Hoyvík · Nantong · Pizza 67 · Føroya Bjór · Føroya Tele · magn · 360° · Trygd · Skousen · Atlantic Airways · effo · Want2Bowl · colorama

SP/F J. & B. KYSTER
MÚRARAMEISTARAR & ENTREPRENØRAR

Múrara- & entreprenørarbeiði
Fasadurenovering
Flísaarbeiði

Alt slag av múraraarbeiði inni sum úti

Postboks 3068 | FO | 110 Tórshavn
Tel. 358188 | 558189
kyster@kyster.fo